# Grønari flogfeløg

Altjóða loftferðslufelagsskapurin IATA hevur sett sær fyri, at flogfeløgini skulu ganga undan í arbeiðinum við at avmarka CO2-útlátið. Giovanni Bisignani, sum er stjóri í IATA, segði í einum fyrilestri í Keypmannahavn í gjár, at flogfeløgini fara at seta sær trý greið mál. Tað fyrsta er, at innan 2020 skal brennievnið hjá flogførunum gerast 20 prosent betri. Annað málið er, at í 2020 skulu 10 prosent av brennievninum skulu koma frá alternativum orkukeldum, og í triðja lagi skal CO2-útlátið frá altjóða flogferðsluni skerjast 50 prosent innan 2050. Í fyrilestrinum mælti Giovanni Bisignani politikarunum til at taka stig, sum skulu eggja flogfeløgunum til at leggja seg eftir at rækka málunum hjá IATA.

# Oljudálking í Eystrasalti

Um middagsleitið í gjár sá eitt danskt umhvørvisflogfar ein stóran oljublett í Eystrasalti einar 10 fjórðingar sunnan fyri Bornholm. Tað dálkaða økið var einar 25 fjórðingar langt, men myndugleikarnir vænta ikki, at oljan fer at reka inn á land á Bornholm, men at hon verður upployst rættiliga skjótt. Ein talsmaður fyri myndugleikarnar sigur við DR, at enn vita teir ikki, hørjum skipi oljan stavar frá, og at roynt verður at fáa staðfest, hvørji skip hava siglt tann vegin. Myndugleikarnir hava tí ikki illgruna til nakað ávíst skip enn, sigur talsmaðurin við danska kringvarpið.



*Blóðið spruttaði í Hvalvík. Helst ein góð mynd til felagsskapir ímóti hvalaveiðu*



*Tað spruttar, tá skotið verður á háls*



*Sóknaronglarnir komu veruliga til sín rætt í Hvalvík*



*Drápið vardi bara eitt korter*

løgregluni. Tað er heldur ikki óvanligt, at løgreglan tekur fólk, sum kanska hava fingið ein dramm ov nógv niður um, og tí fáa onkra revsing, fyri at koyra við kenning. Men leygardagin var løgreglan ikki úti fyri tílíkum støðum.

## Grind seinastu árini

Seinasta grindin, sum hevur verið, var í Hvannasundi 5. januar í ár, tá 90 hval løgdu beinini. Í 2008 var ongin grind, og leitast skal heilt aftur til august 2007 til næstu grindina. Hon gjørdi landgongd í Sandágerði.

Hetta merkir í øllum førum, at kaggarnir hava staðið rættiliga tómir í stórum pørtum av landinum, so helst er hendan grindin kom rættiliga væl við hjá nógvum, hóast onkur helt drápspartarnar vera nakað smáar.



*Skerast skal væl niður fyri, tá skorið verður á háls*



*Tað er rættiliga grunt langt út í Hvalvík*